# BÓKABYRJAN

## LESIÐ SAMAN FRÁ BYRJAN



# HVÍ ER TAÐ GOTT AT LESA FYRI SMÁUM BØRNUM?

At lesa saman skapar eitt vakurt band millum børn og vaksin.

Barnið lærir at lurta og hugsavna seg.

Barnið styrkir sínar sosialu førleikar, innlivingarevni og at góðtaka onnur.

Barnið lærir at orða seg.

At lesa styrkir um málið og orðfeingið.

At lesa økir um møguleikarnar fyri at klára seg væl í skúlanum.

Jú fyrr, tit byrja at lesa saman, jú natúrligari verður tað hjá barninum at elska bøkur!







Jamen, tú dugir ikki at lesa!

# LESIÐ OG PRÁTIÐ

Tá tit lesa saman, lærir barnið at lurta og práta.

Málið hevur stóran týdning, tá barnið seinni skal læra at lesa.



Dukka mín er blá.
Hestur mín er svartur.
Ketta mín er grá.
Máni mín er bjartur
gyllir hvørja á.



Sløkkið sjónvarpið og aðrar skermar. Setið tykkum væl til rættis í sofuni. Lesið í friði og náðum.


Fortel um gamlar dagar.
Syng fyri okkum!




## LESIÐ FYRI BØRNUNUM

Les søguna fyri barninum og prátið um myndirnar. Børnum dámar væl at hoyra røddina á pápa ella mammu.

## LESIÐ OFTA

Børnum dámar væl at hoyra somu søgu umaftur og umaftur.




# LESIÐ ALT

Lesið alt, tit síggja. T.d. lýsingar, vegskelti, bløð og aftan fyri á mjólkapakkum.

Barnið lærir nýggj orð og orðingar við at hoyra tey verða lisin upp.

Prátið um torfør orð.




Maria, Maria, Marolla,
átti so nógvar bollar.
Eg bað hana geva mær ein,
fekk bert ein stein.


Einaferð vóru tað triggjar bjarnir, ið búðu í einum húsum langt úti í skóginum ...

# LESIÐ ALLASTAÐNI

Á gólvinum. Í bussinum.
Á sofuni. Í garðinum. Í songini.
Á spæliplássinum.

# LESIÐ SJÁLVI

Barnið ger, sum tú gert
– ikki sum tú sigur.
Lesur tú, fer barnið eisini at lesa.



# VITJIÐ BÓKASAVNIÐ

Á bókasavninum finnur tú hugskot til góðar bøkur.
Øll eru vælkomin á bókasavnið.
Nógv bókasøvn hava serlig tiltøk fyri smábørn.




Snipp, snapp, snúti,
so var søgan úti.

# LESIÐ BØKUR

Lánið bøkur ókeypis á bókasavninum. Ynskið tykkum bøkur í gávu. Keypið bøkur í bókahandlinum.








# LESIÐ OFTA

Tað er ikki neyðugt at lesa so nógv í senn, men lesið ofta.


BÓKAHANDIL
BÓKASAVNIÐ

# BÓKABYRJAN

## FREDRIKSTAD – RUNAVÍK – DALSLAND

Við tøknini fáa vit eina rúgvu av nýggjum rákum uttanífrá. Tí er tað eyka umráðandi, at vit vaksnu geva okkum stundir at lesa søgur saman við børnunum, so tey varðveita okkara felags søgur.

Í Norðurlondum hava vit eina sterka barnamentan við felags søgum. Vit vaksa upp við somu søgum og persónum, so sum ævintýrunum, Pippi og Kariusi og Baktusi

**Verið við til at byggja ein norðurlendskan bókabarndóm – bók fyri bók, stein fyri stein.**

Bestu nýggju norðurlendsku barnabøkurnar eru at finna á www.bokslukaren.org, har tú har tú finnur hugskot til uppgávur til bøkurnar.

Heilsan frá okkum Føroyar lesa (Føroyar), Bokdagar i Dalsland (Svøríki) og Litteraturhuset Fredrikstad (Noregi).



Samstarvið er stuðlað av Demos í Nordisk ministerråd.

Nordisk Ministerråd

Illustrasjon og design: Vibeke Røgler, ©Foreningen !les 2018, ISBN 978-82-92-89429-3. Det må ikke kopieres fra denne bok i strid med åndsverksloven eller avtaler om kopiering inngått med Kopinor.